# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



†

ANDLÁT

Gjørt verður vart við, at elskaða kona mín, dóttir, systir, verdóttir og svigarinna okkara

**Gunnleyg Kathrina Reynslág**

fødd Joensen, ættað úr Sumba

andaðist hósdagin 24. juni á Malmö sjúkrahúsi, 38 ára gomul.

***Vegna tey avvarðandi***

***Ólavur***

TAK

Tak for blomster, kranse og pengegaver til plejehjemmet i Runavík ved begravelse af

**Jógvan Davidsen, Elduvík.**

Tak til kirketjenere, gravere, sangere og Henning Bøgesvangs, præst, personlige tale ved kisten.

En stor tak til Sambýlið á Skála og plejehjemmet i Runavík for kærlig pleje, omsorg og opmærksomhed, når der var besøg fra Danmark.

Ligeledes en stor tak til familien á Brúnni í Elduvík, der optog vores fader, som familiemedlem, da han efter 50 år i Danmark atter bosatte sig i bygden.

Tak til alle der deltog i højtidlighederne ved vores faders rejse til sit sidste hvilested.

***Diana, Stig og Hjørdis***

*Så tag mig da ved hånden,*
*og led du mig,*
*Til jeg opgiver ånden*
*og dør i dig!*
*Jeg kan ej vandre ene,*
*ej noget sted,*
*det båder mig alene,*
*når du går med.*



# Petur Skeel Jacobsen 85 ár

Í dag, 28. juni, verður Føroya kendasti veðurmaður, Petur Skeel Jacobsen, 85 ár.

Petur Skeel varð føddur í Havn tann 28. juni í 1925. Pápin, Mourits E. Jacobsen, var ættaður úr Kaldbak og mamman av Eiði. Hon doyði á barsilssong við Peturi Skeel.

Sum seks ára gamal flutti Petur til Kaldbaks og vaks upp hjá ommubeiggjanum, Petur Skeel Nolsøe, sum var bóndi í Kaldbak.

Sum 19 ára gamal fór Petur til Havnar á preliminerskúla. Eftir tað fór hann í læru á Gjaldstovuni og arbeiddi har í nøkur ár, til hann sá eina lýsing eftir fólki at koma at starvast á veðurstøðini, sum helt til á Skansanum í Havn. Petur Skeel søkti og fekk starvið.

Veðurstøðin flutti seinni í nýggj hølí við Svalbardsvegin. Petur arbeiddi skiftivís á Gjaldstovuni og á Veðurstøðini. Í 1962 fór hann til Danmarkar, har hann fekk starv hjá Meteologisk Institut.

Fyrst í 90-unum kom hann aftur til Føroya og arbeiddi sum veðurfrøðingur á flogvøllinum í Vágum.

Seinni flutti veðurtænastan av flogvøllinum til Havnar – at húsast hjá Vaktar- og bjargingartænastuni Yviri við Strond.

Tá Petur Skeel gjørdist sjeyti, fór hann frá sum veðurmaður. Tá var hann rættuliga vorðin fólkaogn sum tann hugnaligi veðurmaðurin í »Góðan morgun Føroyar« í útvarpinum, har hann dagliga spáddi um veðrið.

Síðani 1996 hevur Petur Skeel verið fastur fúsur her á Sosialinum. Hann er á blaðnum hvønn dag, har hann skrivar veðurtíðindini á baksíðuni. Hann lesur ymisk veðurkort, og út frá teimum og veðurforsagnunum frá DMI, ger hann so sínar veðurforsagnir. Eisini er hann at hoyra í veðurtíðindunum á Rás2.

Petur hevur eisini ymisk frítíðarítriv. Honum dámar sera væl at dansa føroyskan dans, sum hann altíð hevur gjørt nógv við – eisini árini í Danmark. Hann er eisini virkin í dansifelagnum Dansifrøi.

Kona Petur, Malla, sum var ættað úr Rituvík, doyði í 1987. Tey fingu tríggjar dreingir, sum allir búgva í Danmark við familjum.

Petur er burturstaddur føðingardagin, men vit í Miðlahúsinuim ynskja honum hjartaliga til lukku við degnum!

-red

# Margretha í Vestmanna sum prinsessa



Myndin er tikin í sambandi við eina kongavitjan í 1959. Fríðrikur kongur og Ingrid drottning saman við prinsessunum Margrethu og Benadiktu, sum vitja uppi við byrgingarnar oman fyri Vestamanna.

Á myndini síggjast Fríðrikur kongur og prinsessurnar Margretha og Benadikta.

Páll Mikkelsen verkfrøðingur hjá SEV hevur tikið myndina.

## 85 ára føðingardagur

Týsdagin 29. juni verður Harry Joensen, Klaksvík 85 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Leitisgøtu 23, Argir, har øll eru hjartaliga vælkomin frá kl. 17.

## 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin, 2. juli verður Heini Olsen, Tórshavn, 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Heina, eru hjartaliga vælkomin í Kovalág 10, 2. juli millum kl. 10 og 14.